**UTTANRÍKIS og MENTAMÁLARÁÐIÐ**

# Tíðaravmarkað starv sum fyrstilærari í Hósvíkar skúla

**Uttanríkis- og mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum leiðara, ið hevur áhuga fyri námsfrøðiligari og fakligari menning og hegni at átaka sær leiðslustarv í fólkaskúlanum**

Tíðaravmarkað starv sum fyrstilærari í Hósvíkar skúla skúlaárið 2020-21 verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2020. Í Hósvíkar skúla eru 8 næmingar í 1. - 3. árgangi innskrivaðir næsta skúlaár. Ein lærari umframt fyrstalæraran starvast í skúlanum.

**Um starvið**

Fyrstilærarin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans og fíggjarstýringini. Høvuðsuppgávurnar eru:

- at standa á odda fyri fakligari og námsfrøðiligari menning
- at fremja eina mennandi starvsfólkaleiðslu og virka fyri, at starvsfólk skúlans hava umstøður fyri fakligari menning
- at virka fyri trivnaði og góðum samstarvi við atliti at næmingum og starvsfólki skúlans
- at skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- at fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Førleikakrøv**

- Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum fólkaskúlalærari og starvsroyndir í fólkaskúlanum.
- Tað er ein fyrimunur at hava leiðsluroyndir og skeið ella útbúgving innan leiðslu
- Harumframt skulu umsøkjarar hava áhuga fyri avbjóðingum og førleika at taka neyðugar avgerðir

**Setanarviðurskifti**

Setanarøkið er undir Uttanríkis- og mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Hósvíkar skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er flokkað í lønarflokkunum 31.2 og 31.3 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**

Umsókn saman við avriti av læraraprógvi, C.V. og møguligum viðmælum skal verða Uttanrikis- og mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 15. mai 2020.

**Umsóknin verður stílað til:**

Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 7
Postrúm 3279, 110 Tórshavn
ella við t-posti**:** ummr@ummr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja ella skriva til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044, t-postur: jenny@ummr.fo.

***Uttanríkis- og mentamálaráðið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál, gransking og uttanríkismál. Eisini eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og frítíðarvirksemi.*